# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.05.2022 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jónhild Abrahamsen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 19/22 | 21/00572-14 | Viðgerð av granskoðaðum roknskapið fyri 2021 og viðmerkingum frá granskoðara |
| 20/22 | 22/00294-1 | Setan av nýggjum fíggjarleiðara (málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum) |

1

**Til støðutakan**

## 19/22
## 21/00572-14 Viðgerð av granskoðaðum roknskapið fyri 2021 og viðmerkingum frá granskoðara

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2022 | 18/22 |
| 2 Býráðið | 25.05.2022 | 19/22 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar kommuna hevur, tann 16.mai 2022, móttikið uppskot til grannskoðaðan roknskap fyri 2021 frá Januar – løggilt grannskoðaravirki, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og annars grannskoðaður av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.<br><br>Ársroknskapurin hjá Fuglafjarðar Kommunu fær eina átekning uttan fyrivarni ella ískoytisupplýsingar. Mett verður, at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av kommununnar ognum og skyldum, fíggjarligu støðu og rakstrarúrsliti.<br><br>Í grannskoðaraprotokollini verður víst á lutfalsliga stórar meirnýtslur á fleiri økjum. Grannskoðarin heitir á býráð og umsiting at endurskoða mannagongdir við ger og uppfylgjan av fíggjar- og eykafíggjarætlanum, soleiðis at betri samsvar fæst millum fíggjarætlan og staðfest roknskaparskjøl.<br><br>Ísv. gjøgnumgongd av tryggingum er grannskoðanin komin fram á, at tað eru nakrir tryggingarskaðar sum ikki eru gjørdir upp. Heitt verður á fyrisitingina um at skipa mannagongdirnar soleiðis, at tryggingarskaðar o.a. verður gjørt upp so skjótt sum til ber.<br><br>Høvuðstølini eru samanumtikið hesi:<br><br>Rakstur av kommununi, uttan íløgur, kostaði 75.099 t. kr. Játtanin var 67.329 t. kr. Tað svarar til eitt undirskot á rakstrarjáttanini í 2021 uppá 7.770 t. kr. Av hesum stava 3.107 t. kr. frá minni inntøkum frá §7, Havnin. Tá ið minninýtslan á §3 verður tikin burturúr, er samlaða meirnýtslan á rakstrarjáttanini fyri 2021 uppá 5.640 t. kr. |

2

| Rakstur uttan íløgur | Ætlan 2021 | Rakstur 2021 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting* | 10.337.000 | 12.572.004 | 2.235.004 |
| §2 Almanna og Heilsumál | 26.281.800 | 26.377.143 | 95.343 |
| §3 Børn og Ung | 18.705.000 | 17.727.561 | -977.439 |
| §4 Undirvísing | 3.630.000 | 3.661.678 | 31.678 |
| §5 Mentan og frítíð | 6.718.000 | 6.772.800 | 54.800 |
| §6 Teknisk mál | 6.280.000 | 9.503.027 | 3.223.027 |
| §7 Kommunal virki | -4.623.000 | -1.515.536 | 3.107.464 |
| | **67.328.800** | **75.098.676** | **7.769.876** |

*Við í yvirlitinum er ein eykajáttan til §1 uppá 400.000 kr

Meirnýtslan á §1 kemst av, at peningur er brúktur uppá nýggju býráðsskrivstovuna í samband við at umsitingin flutti í nýggju hølini. Drotningavitjanin kostaði meira enn vænta, stuðul bleiv keyptur til Teknisku Deild, avsetingin til leiðuútreiðslur til umsitingina var ov lág og lønarútreiðslurnar til bæði politikarar og starvsfólk vóru nakað hægri enn væntað.

Fíggjarliga tyngsta rakstrarøkið hjá kommununi er §2 Almanna og Heilsumál. Her er útreiðslan til Samstarvið Nánd sum í 2021 var uppá 20,4 mió. Afturberingin frá landinum til eldraøkið var uppá 17,3 mió. Tvs. at kommunan ber ein meirkostna fyri eldraøkið uppá 3 mió. Hettar er 1 mió kr. hægri enn í 2020.

Tekur man afturberingina frá landinum við í uppgerðina av §2, er tyngsta rakstrarøki hjá kommununi §3 Børn og ung, í kostaði 17,7 mió. Í 2021. Hettar var 977 t. kr. minnið enn ætla. Nakað av forkláringini skal finnast í, at inntøkan hjá dagstovnunum var 403 t. kr. hægri enn vænta og at gongd ikki bleiv sett á nýggja ungdómstilboðið hóast játtan var givin.

Á §6 hevur verið ein meirnýtslan á uppá 51% av samlaðu játtanini. Ein gjøgnungongd av meirnýtsluni samanborði við nýtsluna í 2020 gevur eina ábending um, at partar av játtanini ikki vóru heilt realistiskir og at játtanin kanska burdi verið 8 – 900.000 hægri. Harafturat er uml. 275.000 í inntøku fyri vatn bóka í roknskapinum fyri 2022. Um hædd verður tikið fyri hesum báðum avbjóðingunum, er meirnýtslan allíkavæl 2. mill ov høg. Av hesum stendur vatnveitingin fyri uml. helvtini.

Á §7 var í fíggjarjáttanini rokna við eini netto inntøku uppá 4,6 mió. Rakstrarroknskapurin vísir, at netto inntøkan var 3,1 mió lægri enn vænta. Inntøkan fyri Fuglafjarðar Havn var 2,7 mió lægri enn vænta, og útreiðslurnar fyri Ruskøkið á Klovningi vóru 543 t. kr. hægri enn vænta.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Lønarútreiðslurnar í 2021 vóru uppá 41.053 t. kr. Tað er ein hækking uppá 1.493 t. kr. í mun til undanfarna ár.

Í grannskoðanarprotokollini verður víst á §41 í kommunustýrislógini, sum ásetur, at kommunan er játtanarmynduleiki, og at arbeiðið ikki kann setast í gongd uttan neyðuga játtan.

| Rakstur íløgur | Ætlan 2021 | Íløgur 2021 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | -3.100.000 | 795.262 | 3.895.262 |
| §2 Almanna og Heilsumál* | 5.381.000 | 7.061.530 | 1.680.530 |
| §3 Børn og Ung | 880.000 | 822.743 | -57.257 |
| §4 Undirvísing | 15.500.000 | 16.124.785 | 624.785 |
| §5 Mentan og frítíð* | 8.850.000 | 7.341.181 | -1.508.819 |
| §6 Teknisk mál* | 8.480.000 | 11.880.067 | 3.400.067 |
| §7 Kommunal virki | 3.500.000 | 1.428.004 | -2.071.996 |
| | **39.491.000** | **45.453.571** | **5.962.571** |

*Við í yvirlitinum er ein eykajáttan til §2 uppá 2 mió kr. til Vesturstovu, til §5 uppá 130 t kr. og til §6 uppá 100 t. kr

Íløgurnar vóru 45.453 t. kr. Játtanin var 39.491 t. kr. Sostatt ein meirnýtsla á 5.962 t, kr. Í fíggjarjáttanini var rokna við eini inntøku á §1 fyri sølu av gomlu kommunuskrivstovuni uppá 3,5 mió. Kommunuskrivstovan bleiv ikki seld. Harafturat vóru inntøkurnar á §6 fyri sølu av grundstykkum 4,2 mió lægri enn vænta. Um inntøkurnar fyri grundstykkir og gl. Kommunuskrivstovuna verða tiknar burturúr íløguuppgerðini, var samlaði íløgukarmurin fyri 2021 1,7 mió. lægri enn vænta.



Í grannskoðanarprotokollini verður víst á §41 í kommunustýrislógini, sum ásetur, at kommunan er játtanarmynduleiki, og at arbeiðið ikki kann setast í gongd uttan neyðuga játtan. Her verður víst til meirnýtsluna til íløgurnar á §1 viðv. býráðshúsinum, §2 viðv. Vesturstovu og §4 viðv. skúlanum (Framvit). Talan er um íløgur uppá í alt 3,2 mió har ongin játtan fyriliggur.

| Skattainntøkur | Ætlan 2021 | Íløgur 2021 | Munur |
|---|---|---|---|
| Húsaleiguskattur | -10.000 | -62.224 | -52.224 |
| Kommunuskattur | -66.674.644 | -69.437.535 | -2.762.891 |
| Partafelagsskattur | -14.000.000 | .12.041.296 | 1.958.704 |
| Skattur av kapitaleftirløn | -13-669.000 | -14.769.122 | -1.100.122 |
| Skattur av DIS og FAS | -2.388.000 | -2.486.592 | -98.592 |
| Rentur, netto | 3.400.000 | 2.341.627 | -1.058.373 |
| | **-93.341.644** | **-96.455.142** | **-3.113.498** |

Sum framgongur av omanfyristandandi skemað, vóru skattainntøkurnar 3,1 mió kr. hægri enn vænta í 2021.

**Raksturin í 2021 samanborin við undanfarna ár.**

| Rakstur uttan íløgur | Rakstur 2021 | Rakstur 2020 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 12.572.004 | 11.461.559 | -1.110.445 |
| §2 Almanna og Heilsumál | 26.377.143 | 24.400.772 | -1.976.371 |
| §3 Børn og Ung | 17.727.561 | 16.381.666 | -1.345.895 |
| §4 Undirvísing | 3.661.678 | 4.077.829 | 416.151 |
| §5 Mentan og frítíð | 6.772.800 | 5.668.802 | -1.103.998 |
| §6 Teknisk mál | 9.503.027 | 6.716.860 | -2.786.167 |
| §7 Kommunal virki | -1.515.536 | -5.286.130 | -3.770.594 |
| | **75.098.676** | **63.439.358** | **-11.659.318** |
| **Íløgur í alt** | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 795.262 | 2.919.391 | 2.124129 |
| §2 Almanna og Heilsumál | 7.061.530 | 4.726.565 | -2.334.966 |
| §3 Børn og Ung | 822.743 | 532.489 | -290.254 |
| §4 Undirvísing | 16.124.785 | 42.898.912 | 26.774.127 |
| §5 Mentan og frítíð | 7.341.181 | 13.158.980 | 5.817.800 |
| §6 Teknisk mál | 11.880.067 | 3.519.944 | 8.360.123 |
| §7 Kommunal virki | 1.428.004 | 1.260.161 | -167.843 |
| | **45.453.571** | **69.016.442** | **23.562.891** |
| **§1. - §7. Íalt** | **120.552.247** | **132.455.800** | **11.903.553** |
| **§20 inntøkur** | **-96.455.142** | **-101.288.129** | **-4.832.952** |
| **Gjaldføri frá rakstri** | **24.097.105** | **31.167.671** | **7.070.601** |

Samanborið við 2020, er raksturin uttan íløgur hækkaður við 11.659 t. kr. Av hesum eru 7.700 t. kr. brúktar uttan at játtan fyriliggur. Hettar hevur grannskoðarin, sum áður nevnt, gjørt eina viðmerking til. Íløgurnar lækkaðu 23.562 t. kr. í mun til 2020 og inntøkurnar vóru 4.832 t. kr minni enn í 2020.

Samanlagt gjørdist gjaldførisúrslitið frá rakstrinum eitt hall uppá 24.097 t. kr. Harafturat skal leggjast avdráttir av lánum uppá 7.471. t. kr. Tvs. eitt hall uppá 31.568 t. kr. í 2021

Við árslok 2021 er nettoskuldin 1,2 av eini álíkning. Í grannskoðanarprotokollini verður víst til §43 stk. 2 og §54 í kommunustýrislógini. Út yvir hettar er einasta viðmerking frá grannskoðanini, at kommunan má taka hædd fyri hesum í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2023.

Undir eventualskildur hevur grannskoðarin víst á mál, har kommunan er saksøkt eftir endurgjaldi uppá kr. 1,7 mió. Kommunan metur seg ikki hava endurgjaldsskyldu. Málið er kært til landsrættin.

*Grannskoðarafrágreiðingin verður latin býráðslimum í trúnaði saman við málinum.*



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Býráðsfundur 24. mai 2022**<br>Roknskapurin fyri 2021 saman við grannskoðanarprotokol hevur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini, og verður nú lagdur fyri býráðið til viðgerðar. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Viðgerð av grannskoðanarprotokol ísv. roknskapin fyri 2021 | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Grannskoðanarprotokoll frá Januar grannskoðanarvirki.**<br><br>**Ársfrásøgn 2021 frá Januar grannskoðanarvirki** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin viðgerð roknskapin fyri 2021 saman við grannskoðanarprotokollini. | | |
| Dagf | 14.05.2022 | | |



**Fíggjarnevndin 17. maj 2022:**
Fíggjarnevndin gjøgnumgekk grannskoðanarprotokol og roknskap, og avgjørdi at leggja tað fyri fyrst komandi býráðsfund.

Ásannast má, at ovurnýtsla hevur verið fleiri kontum. Neyðugt er at vísa til §41 í kommunustýrislógini sum vísir á, at arbeiðið ikki má setast í gongd uttan játtan fyriliggur.

**Býráðið 25. maj 2022:**
Býráðið gjøgnumgekk roknskapin fyri 2021 og samtykti einmælt at góðkenna roknskapin.

## 20/22
## 22/00294-1 Setan av nýggjum fíggjarleiðara

***Hetta mál varð viðgjørt fyri afturlætnum hurðum sambært §26 stk. 1 í kommunustýrislógini og § 1, 2. petti í fundarskipanini hjá Fuglafjarðar býráð.***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.05.2022 | 20/22 |

7

Fundurin lokin kl.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen